# Ársaðalfundur

## í P/F Suðuroyar Sparikassa

SUÐUROYAR SPARIKASSI

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Suðuroyar Sparikassa mánadagin 2. mars 2026 kl. 16.00 á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Suðuroyar Sparikassa, Vágsvegur 60, Vágur.**

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.

2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.

3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum.
   *Skotið verður upp at útluta 800 t.kr. í vinningsbýti fyri árið 2025, og at flyta restina av yvirskotinum, 3.826 t.kr., til næsta ár.*

4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunsins at tilnevna ein nevndarlim sambært § 14.

5. Val av nevndarlimum.
   *Rúni Joensen og Niels Johannessen standa fyri vali sambært § 14, stk. 2, og § 21, stk. 4 í viðtøkunum. Nevndin mælir til, at Rúni Joensen og Niels Johannessen verða afturvaldir.*

6. Val av grannskoðan.
   *Nevndin mælir til afturval av verandi uttanhýsis grannskoðara, Sp/f NUMO, góðkent grannskoðanarvirki.*

7. Uppskot frá nevndini:
   a) Nevndarsamsýning 2026: *Nevndin mælir til, at samsýningin til nevndarlimir felagsins verður óbroytt galdandi fyri 2026 soleiðis, at aðalfundurin viðtekur at samsýningin til nevndarlimir felagsins fyri 2026 verður latin samsvarandi samsýningar politikki felagsins frá mars 2022, við støði í hesum:*

   *Grundsamsýning: 60.000 kr.*
   *Nevndarformaður: 2 x grundsamsýning*
   *Næstformaður: 1,5 x grundsamsýning*
   *Aðrir nevndarlimir: 1 x grundsamsýning*

   *Fyri eykaarbeiði, í nevndini ella aðrari nevnd ella serligar nógvar nevndarfundir, kann veitast ein eykasamsýning.*

   b) Uppskot um at broyta § 8, stk. 1, í viðtøkunum frá at vera soljóðandi:
   *"Aðalfundurin verður hildin í Vági eftir avgerð nevndarinnar. Nevndin boðar til aðalfundar við kunngerð í einum ella fleiri av teimum føroysku bløðunum og skrivliga til teir í partabrævabókini skrásettu partaeigararnar, sum hava biðið um tað."*

   til at verða soljóðandi:
   *"Aðalfundurin verður hildin í Vági eftir avgerð nevndarinnar. Nevndin boðar til aðalfundar við kunngerð á heimasíðu felagsins. Harumframt verður skrivlig innkalling send til teir í partabrævabókini skrásettu partaeigararnar, sum hava biðið um tað."*

   Ásetingarnar í § 8, stk. 2, 3 og 4, vera óbroyttar.

   Til at viðtaka uppskot b) krevst sambært § 106, stk. 1, í vinnufelagslógini og § 13, stk. 2, í viðtøkunum, at uppskotið verður viðtikið við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum samlaða partapeninginum, eisini partabrøv omanfyri ognaravmarkingini í § 5 í viðtøkunum.

8. Ymiskt

Fyri at hava rætt til at møta á aðalfundinum skulu partaeigarar, fólk við fulltrú og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi tórsdagin 26. februar 2026 hava boðað felagnum frá luttøku á deildum felagsins í Vági ella í Tórshavn.

Rætturin hjá einstøku partaeigarum felagsins til at luttaka á aðalfundinum og at greiða atkvøðu verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum viðkomandi partaeigarar eiga mánadagin 23. februar 2026.

Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva skrivliga fulltrú. Fulltrúarskjal er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins.

Skjal at nýta í samband við møguliga brævatkvøðu er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins. Um so er, at tygum ynskja at geva brævatkvøðu skal brævatkvøðuskjalið vera móttikið á høvuðsskrivstovu felagsins í seinasta lagi mánadagin 2. mars 2026 kl. 13.00.

Grannskoðaða ársfrásøgnin kemur saman við dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum at liggja frammi á høvuðsskrivstovu felagsins í Vági í seinasta lagi 2 vikur fyri aðalfundin.

P/F Suðuroyar Sparikassi
*Nevndin*

Annijanni